# Vikuskifti

Nr. 85 • Vikuskiftið 7./8.. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo



Mál og Mið

TING-HELLAN

Tinghellan síða 37


# Rock and Roll og Blues í Miðlahúsinum

## Skansa Big-Band spældi í Miðlahúsinum í Vágsbotni seinasta sunnudag







*Swing, blues, rokkur, og latín frá Skansa Big-Band í Miðlahúsinum*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*


TÓNLEIKUR

*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*


Nógv fólk var komið at lurta í Vágsbotni, tá tónleikaúrmælingarnir frá Føroya Musikkskúla vístu síni kynstur fram.

Skansa Big-Band hevur verið á konsertferð í Íslandi, og nú savna tey saman til eina ferð til Brasilia í næsta ár. Konsertin í Miðlahúsinum var ein liður í hesi innsavnan.

Tað er Katrin Jørgensen, lærari á Musikkskúlanum í Havn, sum stjórnar Skansa Big-Band.

Tvey nýggj tónleikastykkir vórðu framførd sunnudagin; rokkstykki "Sólarklárt" eftir Atla Petersen og "Swingovski" eftir Eiriki Skála, alias Erikovj Skalavovskij.

- Hetta eru tvey av teimum fyrstu føroysku stykkjunum skrivað fyri big-band, sigur Katrin Jørgensen, lærari á Musikkskúlanum.

Musikkskúlanæmingarnir í Skansa Big-Band, sum framførdu tann nýggja føroyska bigband tónleikin, eru millum tíggju og fimtan ára aldur. Summi hava einans spælt í tvey ár, og onnur hava tóna í longri tíð.

Leiðarar og lærarar hjá Skansa Big-Band eru Atli Petersen, Eirikur Skála, og Katrin Jørgensen.